## Skip lak tungolju

Sløkkiliðið í Reykjavík hevur havt úr at gera um hvítusunnuna við at taka upp tungolju, sum rann úr farmaskipinum Medemborg, sum á við bryggju í Sundahavnini. Íslendsku bløðini skriva, at tað er ikki greitt, um tað var eitt tekniskt óhapp, sum elvdi til oljulekan, ella um talan var um eitt menniskjaligt mistak. Hildið verður, at umleið 600 litrar av tungolju fóru á sjógv, og á midnátt í gjárkvøldið vóru menn ikki lidnir at taka oljuna upp.



*Fjøran við Sundahavnina var svørt av oljuni*
*Mynd: Morgunblaðið*

## Nýggj heimasíða við málkjaki

Málfelagið hevur gjørt eina heimasíðu við málkjaki. Felagið varð stovnað í 1993 og æt tá Mál- og litteraturfelagið. Nevndarlimir í málfelagnum eru André Niclasen, Dan Reinert Petersen og Regin Eikhólm. Málfelagið hevur eisini eina máltænastu, sum tekur ímóti fyrispurningum um mál. - Vit svara eftir førimuni. Vit hava eisini eitt yvirlit yvir umsetarar, sum kunnu umseta millum hesi mál: føroyskt, danskt, enskt, týskt, russiskt, franskt og spanskt, sigur felagið á heimasíðuni. Felagið hevur eisini til endamáls at vekja ans fyri føroyskum máli og skaldskapi. Heimasíðan hjá felagnum finst www.umseting.fo

# sligari spreinging



*- Eg sá púra einki, beint eftir at minan var brostin. Alt var kaos inni í bilinum, sigur Valdimar Tjørnudal*



*- Fleiri aðrir hermenn hava verið úti fyri tí sama sum vit, sigur Valdimar Tjørnudal. Men hetta er fyrstu ferð at danskir hermenn hava verið úti fyri so ógvusligari spreinging*

Men eitt Guds undur bjargaði teimum frá tí ringasta sum henda kundi.

- Men taðvejden, man reagerar so løgið aftaná eina slíka hending. Vit sótu fyrst bara og flentu eftir hesum, hóast tað kann ljóða heilt víð síðuna av, tá ein júst er sloppin við lívinum eftir eitt slíkt álop.

- Ein hugsar eisini um, hvat ein kundi havt gjørt betri og hvussu makkararnir hava tað. Ja, ein hugsar næstan meiri um teir enn um seg sjálvan.

- Seinni settu vit okkum so niður at tosa um tað sum veruliga var farið fram – og serliga um tað, sum KUNDI verið hent. Hetta var góð psykologi-hjálp fyri okkum, at kunna tosa við hinar um alt hetta, sigur Valdimar.

### Fullkomið kaos

Hesa løtuna komu teir koyrandi friðarliga í einum bilafylgi. Teir vóru tann aftasti bilurin, og vóru júst í ferð við at snara bilinum annan vegin, tá alt bara bleiv buldur og brak.

- Vit bóltaðu runt inni í bilinum, og har var alt í einum ógvusligum kaosi: Vatn, støv, útgerð, elektronikkur og alt fleyt runt inni í bilinum. Mín fyrsti tanki var, at her var okkurt spinnandi galið, sigur Valdimar Tjørnudal.

Hann sat aftanfyri hann, ið stýrdi bilin, og sat og durvaði eitt sindur, tá teir rendu á minuna. Næstu løtuna merkti hann okkurt í øðrum fótinum!

Hann var vorðin skaddur í bardaga!

### Smæstu petti

Ein partur av mótstøðuni hjá talibanunum hevur verið at leggja landminur út ymsa staðni. Hesar, saman við teimum sum russar løgdu út í síni tíð, eru enn til stóran ampa fyri tey lokalu og teir útlendsku hermenninar.

Leygarmorgunin bar soleiðis á, at ein av manningarbilunum hjá herdeildini rendi á eina av hesum landminunum. Henda var upprunaliga ætlað størru akførunum, so sum stríðsvognum og kundi lættliga sprongt ein slíkan í smæstu petti.

Manningarbilurin hjá Valdimari er munandi minni og ikki eins sterkur og ein stríðsvognur. Hóast teir raktu landminuna, fór bilurin ikki so illa sum ein annars kundi væntað!

- Ja, vit vóru sera hepnir, sigur Valdimar. Ein slík landmina liggur væl grivin niður í vegin, og er nærum ómøgulig at síggja.

### Hol uppá tríggjar metrar

Hetta er ein sterk mina við trimum løðingum, sum bresta hvør eftir aðrari eftir ongari tíð. Tíbetur brustu bert tvær teirra í hesum førinum.

- Brast tann triðja løðingin, so stóð ikki væl til hjá okkum, sigur føroyski hermaðurin.

Ikki tí, bresturin var ivaleysa sterkur, tí aftaná kundu teir staðfesta eitt 3 metrar stórt hol í vegnum, har minan brast.

Beint eftir hendingina leygarmorgunin, komu Valdimar og hinir báðir undir læknahond. Staðfestast kundi, at hann hevði fingið mesta skaðan av teimum trimum – skaðar í báðar hælirnar, meðan hinir báðir fingu smærri snuddir.

Hann varð síðani fluttur á Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn, har hann í morgun skal kannast enn meiri. Men fyri Valdimar er stríðið – bæði so og so! - ikki av:

- Eg ætli mær avstað aftur til Afghanistan so skjótt sum eg kann. Eg ætli mær at fullføra tað arbeiðið, sum vit eru byrjaðir uppá!

## Avstað aftur

Fyri ein føroyskan hermann at arbeiða í fíggindalandi er hetta ein roynsla, sum teir mugu liva við hvønn einasta dag.

Fyri teir er helst tryggast at halda seg á herstøðini – Camp Bastion – men fara teir út um portrið, lúra vandarnir allastaðni: Talibanar, minur ella annað sum kann vera teimum donsku hermonnunum at skaða ella at bana.

- Vandin lúrir í roynd og veru beint uttanfyri portrið á herstøðini. Tá vit fara útum, vita vit jú ikki um vit koma heilskapaðir aftur.

- Hetta er tann veruleikin, sum vit liva í. Ein má bara vera kaldur og sláa kalt vatn í blóðið. Vit eru settir her at gera eitt arbeiði, og mugu tí ikki lata hugsanina um allar vandarnar taka yvirhond, sigur hann.

Teir tosa ofta um tað vandafulla arbeiðið sum teir eru í dagliga. Teir mugu í veruleikanum fyrireika seg uppá tað, at tað, sum hendir øðrum, eisini kann henda teimum.

- Ja, vit mugu bara góðtaka, at eru vit á skeiva staðnum til tað skeiva tíðspunktið, so kann tað enda forferdiligt. Hetta er nakað sum ein bara má læra seg at liva við, slær Valdimar Tjørnudal fast.

> *Ein má bara vera kaldur og sláa kalt vatn í blóðið. Vit eru settir her at gera eitt arbeiði, og mugu tí ikki lata hugsanina um allar vandarnar taka yvirhond*

> *Eg ætli mær avstað aftur til Afghanistan so skjótt sum eg kann. Eg ætli mær at fullføra tað arbeiðið, sum vit eru byrjaðir uppá*

> *Vit mugu bara góðtaka, at eru vit á skeiva staðnum til tað skeiva tíðspunktið, so kann tað enda forferdiligt. Hetta er nakað sum ein bara má læra seg at liva við*